VIÐMERKINGAR

# Heilavasking á donskum statshospitali

**Jákup Vang**

Kæri lesari, nú eru tað nøkur ár síðan eg skrivaði um psykiatri, og tað av góðum grundum, eftir míni meting.

Tí, sjálvandi ynskja hesir læknar, væl uppbakkaðir av sínum starvsfólkum í heilsuverkinum, IKKI, at teir verða avdúkaðir sum nærmast at kalla kvaksalvarar.

Hetta eru sterk orð. Men – eg meti at eg kann standa við tey.

Og tá eg sigi at tað er av góðum grundum, at eg ikki havi skrivað í fleiri ár, er orsøkin tann, at læknarnir hava forðað mær á ymsan hátt.

Millum annað bleiv eg psykiskt mishandlaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum hevði til fylgju, at eg bleiv strongdur og harvið fekk ov høgt blóðtrýst, sum aftur hevði við sær, at hjartað bleiv ovbyrjað. Og havi eg nú eitt veikt hjarta og má taka nógv medisin fyri at liva.

Hetta kann eg koma aftur til eina aðru ferð, um Gud vil.

Lat okkum venda aftur til yvirskriftina. Hví skuldu danskir læknar viljað heilavaska ein tilvildarligan persón. Lat okkum líka nevna ein føroying ???

Sum ofta verður sagt: Ein góður spurningur. Mítt »guess« er: Ómegd og ikki minst arrogansa, hugmóð og erpni.

Tí, hvør hevur nakrantíð hoyrt læknar viðganga, at teir hava tikið feil?

Sum eg fyrr havi verið inni á: Vísindin droymir um at stýra verðini. Teir vilja hava makt. Og tað eru tað tíverri fleiri, ið vilja.

Tað skal eitast so »pent«, at teir, læknarnir, vilja »passificera« voldiligar persónar.

Og til hesar royndirnar brúka teir alla handa midlar. Ein partur hevur tað vakra navnið medisin. Men tað er nógv annað »medisin«, sum als ikki er vakurt. Vit vita um medisin, sum kann gera fólk ør í høvdinum, t.d. lsd, sum hevur verið nýtt til viðgerð av sjúklingum. Og vit vita um, at psykosa kann framkallast kunstiga hjá frískum fólki.

Og vit kunnu nevna hypnosu. Í teim skeivu hondunum er hon lívshættislig. Tað eru nógv evni, medisin, sum verður nýtt, sum røra við tað okkulta. Og har eru psykiatarar »ekspertar«. Men Jesus hann vilja teir treyðugt tosa um.

Sum ungur maður, bert 22 ára gamal í 1960, bleiv eg innlagdur á Statshospitalið í Nykøbing Sj. Og har bleiv eg, óavvitandi, útsettur fyri roynd at heilavaska meg. Ferð eftir ferð, minst tríggjar ferðir yvir eini trý-fýra ár.

Eg var ungur og góðtrúgvin, setti mítt álit á læknarnar. Visti lítið og einki um heilavask. So tað kom mær ongantíð til hugs, at læknar í frælsa vesturheiminum kundu brúka slíkar djevulskar hættir, sum frætt er frá Stalin-tíðini og Koreakrígnum, har kommunistar nýttu slíkar harðrendar metodur móti mótstøðufólki.

Men brádliga nú ein dagin gekk upp fyri mær, hvat eg hevði upplivað á statshospitalinum. Eg segði við meg sjálvan: Jákup, tú hevur ongantíð verið svakur. Hetta hevur verið heilavask, ella rættari, roynd at heilavaska teg.

Eg fór so at leita í leksikon um heilavask. Og rætt var gitt.

Orð til annað samsvarar tað, sum eg upplivdi á Statshospitalinum, við tað, sum er greitt frá í leksikon.

Eg skal stutt endurgeva, hvussu leksikon greiða frá heilavaski: Listinlærdur psykologiskur teknikkur, ein langtíðar hvølfull psykisk viðgerð fyri at fáa ein persón at skifta støðu ella meining. Við heilavask framkallast eingist og skuldarkensla, sjálvsábreiðsla, fyri at niðurbróta alla persónsmensku og sjálvsálit – tað verður brúkt psykisk og sosial kroysting, eyðmýking og spottan. Fyrst verður persónurin psykiskt knústur, so hann gevur seg viljaleysur yvir, og síðan byggja valdsharrarnir hann uppaftur eftir teirra tykki og idealum.

Hvørji ideal hava modernaðir læknar, hvønn moral og etikk??? Mín sannroynd er, at teir flestu ikki trúgva upp á Gud og hansara kærleika. Hvat er so eftir???

Ífylgi profetin hjá psykiatarunum, Freud, er kynslívið alfa og omega. Kærleikin er sentreraður um undirlívið.

Men av tí at eg trúði á Hin Altvaldandi Gud, megnaðu teir ikki at knúsa mína persónsmensku. Og tað vil eg prísa og lova mínum Frelsara fyri, Jesus Kristusi.

Henda viðferð, sum eg fekk, hevði eina meinslan av sál mín, sum hevur fylgt mær í øll hesi ár – yvir 40 ár. Og enn beri eg arr og brek eftir sokallaðari læknaviðgerð.

Men Gud havi lov og tøkk, at eg eigi Jesus í mínum hjarta.

Tað, sum eg harmistmest um er, at tað framvegis eru so nógv, so óteljandi nógv menniskju, sum fáa somu viðferð av psykiatarum og heilsuverkinum sum heild.

# Føroyar sum ferðamál

**Marjus Dam**
*Løgtingsmaður*



Fíggjarliga eru vit í mótvindi í løtuni. Loysingarpolitikkurin kostaði nógv, tí umframt skerdan blokk, so lógu Føroyar og róku fyri vág og vind á so mongum økjum. Nógv var tosað. Mong og kostnaðarmikil álit vórðu skrivað. Úrslitini hava vit so nú.

Men hendur so nógv nú, sum vit kundu hugsa okkum?. Tann spurning kunnu vit seta okkum sjálvum – vit sum sita í samgongu.

Eitt er bók at lesa, annað er skip at føra. Hetta er so sera rætt.

Í mong ár hevur verið tosað um, hvussu neyðugt tað vinnuliga er at hava fleiri beina at standa á.

Eitt av hesum beinum er ferðavinnan. Fyri kortum kundi lesast áhugaverd grein um, at eitt ferðafólk kastar av sær tað sum svarar til 1 tons av toski. T.v.s. 40.000 ferðafólk sv t 40.000 tons av toski.

200.000 ferðafólk svara til.... Áhugavert. Og vit hava tosað um ferðavinnu í mong ár. Vit hava sett okkum mál. Ella hava vit nú tað?

Hvussu ber tað til, at almenna Hetland hevur vunnið nógvan pening uppá Norrønu, hóast teir hava sett nógvan pening í hesa verkætlan?

Í Føroyum verður tosa um ferðavinnu frá almennari síðu – men hvar er almenni áhugin annars? Hvar er roknistykkið um, hvat ferðavinnan hevur kastað av sær, og kann kasta av sær?. Og hvar er roknistykkið, um Norrøna verður mist av landinum. Hvat fer tað at kosta, um ein stórur partur av ferðavinnuni fer fyri bakka?

Gamla Norrøna fekk eitt lán frá tí almenna í kreppustøðu, og tað varð goldið aftur eftir fáum árum.

Eiga vit ikki at kanna eftir, um tað sama kann/skal gerast enn einaferð?

Eg haldi, at sjóvegis vegurin um Norðuratlanshav eitur Smyril Line og Norrøna. Og eg haldi, at vit skulu syrgja fyri at hava hendan veg opnan og á føroyskum hondum. Uttan Norrønu kunnu vit gloyma rættiliga nógv um ferðavinnuna.

Ynskja vit at Føroyar skulu fáa eitt ferðavinnubein at standa á, so eiga at satsa uppá at hetta kann gerast veruleiki, og ikki bert geva upp, um tað lotar eitt vet ímóti. Tað er nú, vit mugu stríðast fyri ikki at missa alt fyri bakka. Og eg haldi, at tað kann fara at vísa seg at verða ein skilagóð íløga í framtíðina.

Eiga Føroyar ikki at verða eitt ferðavinnumál í framtíðini?

Eg haldi, at almennu Føroyar eiga at kanna hvat skilagott er at gera, so Norrøna ikki gleppur okkum av hondum. Hvat hevur ferðavinnan, orsaka av Norrønu givið Føroyum. Hvat kunnu vit vinna. Og ikki minst – hvat kunnu vit missa við onki at gera og onki tora?

Latið okkum kanna, um tað ikki er skilagott at satsa, og hvat ein skilagóð satsning er.

Vit tosa um framtíðar ferðavinnuna. Og eg haldi, at hon er verd at satsa uppá. Eg rokni við, at við skipum sum Norrønu, kann Norðuratlanshav gerast eitt nógv størri ferðavinnuøki, enn tað er í dag.

Men um onki skip er, ja, so ber ikki til.

Eiga almennu Føroyar at fara inn við 100-200 milliónum? Eg spyrji, tí at eg haldi, at tað er ein áhugaverdur spurningur. Í eigur at verða kannaður og svaraður skjótt.

# Norðuratlantsbólkurin

**Palli Dalsgaard**



Tað arbeiði vit hoyra um, ið hjálparfólkini hjá tjóðveldis fólkatingsmanninum hava gjørt í Danmark hesi seinastu árini, hevur ikki tað stóra virði, um tað í heilatikið hevur nakað virði. Tann ið hevur so góða tíð kann saktans leita í gomlum skjølum eftir gomlum syndum. Og størri mistøkini eru hjá hesum gomlu knarkunum, ið stýrt hava land og ríki, fyri øldum síðani, størri er frøðin hjá hesum leitingarfólkum ið lítið annað hava at hugsa um. Tað kann gott vera, at tað er eitt søguligt virði í hesum skjølum, men tað skal meira til lívið enn hettar fullveldismøsni ið er tann reyði tráðurin hjá tjóðveldisfólkunum.

Vit hava hug til at gloyma tað vit hava og hava fingið gjøgnum tíðina sum farin er. Sjálvur koyrdi eg rutukoyring á Sandoynni í mínum ungu døgum. Tá var ikki bilur í hvørjum húsi sum nú, tí kundu fleiri fólk samlast um bilin tá hann kom í eina bygd, og var til tíðir prátið lívligt. Serliga uppundir val kundu bylgjurnar ganga høgt. Kann serliga minnast tann eina morgunin, val stóð fyri durum, orðadrátturin var í so harðligur, tá eg var líðugur at avgreiða tað eg skuldi, og var komin í aftur bilin at sita, at ein eldri maður kom inn og lat hurðina væl aftur eftir sær, og segði við meg: »Eg havi alla mína tíð verið sjálvstýrismaður, og síðan fólkaflokkurin var stovnaður, havi eg valt tann flokkin. Men eitt kann eg siga tær. Tað er Petur Mohr Dam, sum fekk okkum fólkapensjónina, og um hon ikki kom í tí sáligu stund heðvi tað enda galið í Føroyum«.

Tað hesin gamli maðurin segði fyri mongum árum síðani, er nakað sum tit, sum hava latið tykkum stilla upp til valevnir á javnaðarlistanum, eiga at leggja tykkum í geyma. Vit hava ein ómetaligan fyrimun við at hoyra saman við kongaríkinum, og koma altíð at hava brúk fyri tí fyrimuni í komandi tíðum. Fullveldis tosinum liva vit ikki av, tað skal meira til hestin enn bóksli, minnist til tað. Lisbeth Petersen var ikki við í hesum bólkinum tað tíð hon sat á Fólkatingi, og tað gjørdi hon rætt. Kemur ein javnaðarmaður á fólkating hesaferð, sum vónandi hann kemur, so eigur hann at vera varin fyri teimum har eru. Vit hoyrdu Atla Dam í fimmaranum hettar kvøldið, hvat hann segði um hattar arbeiði hjá Norðuratlantsbólkinum, Atli visti hvat hann tosaði um.

Út er komin faldari frá tjóðveldinum um at biðja velja seg, tí teir eru teir ið arbeiða. Ikki eiti á arbeiði, teir sótu við maktini í heili seks ár, arbeiði hjá teimum var, tjóðveldistos uppaftur í sama, hartil fleiri kostnaðarmiklar ferðir til Amerika, til hvat mundu teir neyvan vita sjálvir. Men rætt skal vera rætt, síðan Tjóðveldisfólkini fóru úr Landsstýrisnum, hava spurningarnir á løgtingi og fólkatingi, frá teimum verið so mangir, at tað má vera eitt arbeiði at minnast til allar.